# Muslimska Sløri𝐝

## – tvær meiningar

**– Hví ganga muslimskar kvinnur við sløri? Hetta kann verða trupult hjá okkum at skilja. Niðanfyri prenta vit tvær hugsanir um muslimska slørið, sum í modernaðu tíðunum er vorðið eitt stríðsmál, har tað ofta snýr seg um at standa ímóti útlendsku og ikki-muslimsku valdsharra-ávirkanunum**

MUSLIMAR

*Johan Jacobsen*

Høvðusendamálið við hesi grein er eittans - at peika á tann fleirlagaða, fløkta og fjølbroytta arábiska og muslimska heimin.

Muslimska slørið umboðar gjøgnum tíðarinnar gongd ymisk virði, ið broytast ættarlið eftir ættarlið. Hendan staðfestingin hevur alstóran týdning, um ein skal koma nær at einum rímiligum svari um, hvat slørið umboðar og um hví muslimskar kvinnur ganga við slørinum. Slørið er serliga í modernaðu tíðunum eitt stríðsmál, her tað ofta snýr seg um at standa ímóti útlendsku ikki-muslimsku valdsharra-ávirkanunum.

Her eru tvey innlegg úr stóra kjakinum um slørið, ið eru føroyskað úr ávikavíst úr donskum og enskum. Tey eru ikki beinleiðis í samband við hvørt annað, uttan so at tey umboða tveir mótpolar í kjakinum. Tíðarmunurin millum hesi bæði innleggini er umleið 14 ár.

Tað fyrra er skrivað í umleið 1989. Tey fýra brotini eru úr arabiskari bók, »Politisku dimensjónirnar við slørinum«, sum útkom í 1989 í Cairo, Egyptaland og tað er skrivað av einum dulnevndum høvundi, »Sharazada«, hetta er allarhelst ein kvinna.

Tað seinna innleggið er á enskum, skrivað fyri umleið tveimum mánaðum síðan av heimskenda arábiska yrkjaranum Adunis. Hetta er ein hugleiðing til ein ensktalandi lesaraskara, til blaðið al-Hayat – í hesum førinum, flest enskt-lesandi arábarar – viðvíkjandi kjakinum um slørið í Fraklandi.

Tó, bæði innleggini umboða ein gjøgnumskurð av deildu meiningunum um slørið. Tað fyrra umboðar tann átrúnaðarliga vongin. Tað seinna hoyrir til tann intellektuella- sekulera partin.

### Um tað arábisku Sharazada

**Her má vera gitt eitt sindur.**
Strangur sensurur ger seg galdandi í øllum teimum arábisku statunum, so tað er væl skilligt at dulnavn verður nýtt í hesum førinum. Slíkar átrúnaðarligar bókmentir sum hendan, ið eisini óbeinleiðis finst at teimum ráðandi í samfelagnum verða helst sensoreraðar og viðkomandi høvundur revsaður, ofta fongsulsrevsing. Men svarti marknaðurin er sterkur, so staturin hevur ikki fullkomið vald á øllum bókaútgávum.

»Tann arábiska...«, staðfestir hvat mál hvat mál viðkomandi tosar og møguliga liggur okkurt tjóðskaparligt aftanfyri.

**»Sharazada«**
Hetta navnið er kent frá frásagnunum úr søguni »Túsund og ein nátt«. Søgan er bygd rundanum kongin Shahrayár, ið hevnir seg inná allar jomfrúur, tí hansara kona hevur verið honum ótrúgv. Hvørja nátt giftir hann seg við eini nýggjari jomfrú, sum hann drepir, tá tað tekur at lýsna. Sharazada er døttir ein av kongsins ráðharrum. Hon steðgar hesum ræðuliga atburðinum, við at siga sera spennandi søgur og steðga frásøgunum júst tá dimmið kemur á.

Hetta er eitt sera kent navn í arábiska heiminum og verður t.d. ofta brúkt í modernaðum arábiskum bókmentum.

### Fakta um Adunis

Adunis er pennanavni hjá høvundanum, tað stavar annars frá grikska natúrgudinum.

**Navn:** ´Ali Ahmad Sa´id
**Føðistaður:** Kassabin, nær við býin Latakia í Sýria
**Føddur:** 1929
**Búðstaður:** Libanon og Frakland
**Kendur fyri:** Tann mest týðandi modernaði arábiski yrkjarin. Hann útviklaði ein slóðbrótandi hátt at skriva yrkingar á arábiskum – fleiri hava fylgt hansara leiðum. Í 1957 var hann við til at stovna bókmentatíðarritið Shi´r og seinni tíðarritið Mawaqiif í 1968, bæði hava tey havt stóran leiklut í arábiskum mentanarlívi.
**Starv:** Professorat í arábiskum bókmentum á Lebanese University í Beirut frá 1970-85, professor í arábiskum á Sorbonne 1980-81 og hevur eisini lært frá sær og hildið fyrilestrar í fleiri øðrum vesturlendskum universitetum. Annars er hann virkin høvundur og bókmentaummælari.

**H**

# Slørið

**Úr Jakob Skovgaard-Petersens »Moderne Islam« frá 1995**

Í bókini »Politisku veruleikarnir hjá slørinum« fer høvundadulnavni, »Tann arábiska Sharazada« gjøgnum átrúnaðarligu, samfelagsligu, mentanarligu, sivilsku, politisku, fíggjarligu og estetisku síðurnar av slørinum. Hesi fýra brotini eru úr kapitlinum um tann samfelagsliga týdningin. »Al-Bu`d as-siyasi li l-hijab«, az-Zahra, s. 13, 47, 48-49, 53-54, Cairo 1989.

Spurningurin um slørið er, sum mann sigur, einans ein dropi í havinum, men á aðru síðuna er tað eisini eitt mál, ið hevur grundleggjandi týdning fyri muslimsku kvinnuna. Tí tað er eitt avgerandi stig móti reinleikanum og skylduni; bæði í andaligum reinleika, intellektuellum opinleika og kensluligum nøgdsemi og sum ein útvíðkan av tí universinum, har menniskjað livir í reinari trúgv og setir seg upp móti harðræði. Tað veri seg sálarinnar egna formyrkaða harðræði ella tann politiski veruleikin við øllum sínum harðræðis regentum, ið politisera alt. Slørið blívur hervið ein miðil til at mótseta seg harðræðinum her á jørð og eitt tekin um vakurleikan hjá tí muslimsku kvinnuni, um hon veruliga ynskir at vera vøkur. Hetta markerar, at hon avvísir modernaðu sivilisatiónina við øllum tí hon hevur við sær av samfelagsligum trupulleikum og sálarligum fløkjum fyri kvinnuna...

Menniskja hevur síðan skapanina havt eina trongd at verja sín skamm og tá vit í okkara tíð eru vitni til ein kroppsligan atburð, sum stíðir móti tí menniskjasligu natúruni, so kemst hetta av at mátistokkurin fyri rætt og skeivt er broyttur: fólks nakni skammur er prísgivin við vakurleikavirðum, tí menniskjað hevur mist síni virðir sum menniskjað og líkist meiri og meiri djórunum... Tað islamiska samfelagið, øll umman*, líðir av eini sjúku, ið ber navnið moralskt forfall og alt hetta upphitaða kjakið um kvinnunnar tilsløran í islamiskum samfeløgum er úrslit av hesum nakinleikanum og ótilslørleikanum...

Slørið er eitt tekin um ta sosialu útviklingina í tí islamiska samfelagnum. Gjøgnum søguna hevur slørið ført við sær útvikling, tí tá kvinnurnar hildu fast við slørið, komu tær longri burtur frá eygnakastinum hjá monnunum og vórðu harvið ikki undirlagdar honum, men blivu fríar. Tað var bara trælkonur, ið pyntaðu seg og hildu sostatt fast um jahiliya-liviháttin. Harímóti hevur tað islamiska samfelagið tikið seg fram í fasum, frá einum andaligum yvirlegni til eitt veruligt yvirlegni fyri heimsins mótstandi. Fylgjandi bleiv portrið til fleirgudadyrkararnar, gyklararnar og ólevnaðfólk læst og tann sanni [islamiski] samfelagsbygnaðurin traðkaði fram við teimum lógum, ið stýra honum. Tað blivu tær trúgvandi kvinnurnar, sum framtónaðu hendan bygnaðin og aktaðu guddómligu lógirnar. Har var ein samvitskunnar vakning, ein hjartans reinleiki og eitt intellektuelt tilknýti til Guðs rættvísi, Hann verið prísaður og upphevjaður.

Í dag er alt ymiskt frá hvussu tað var í fortíðini, men eisini í dag er dyrkanin av Gudi tað sama sum framstig og stríðið fram eftir einum gløðandi morgindagi, har royndirnar hjá tí fyrsta islamiska samfelagnum inspireraðu ein og hvønn trúgvandi mann og kvinnu. Slørið er tí ikki bara ein verja av kroppi, æru og vakurleika hjá tí muslimsku kvinnuni; tað er samstundis at halda fast við Guds opinbering, sum í útgangspunktinum er veruleikin av rættvísi á jørð og er lík við tilbiðjan av Gudi. Lovaður verið Hann, sum skapti okkum, aleina fyri at vit kunnu æra honum - er tilbiðjanin av Honum ikki tað størsta framstigið? Er hetta ikki framstig, ið leiða til tað mest framkomna samfelagið? Tað liggur á okkum at útforma eitt muslimskt samfelag, ið tilbiðir Gud og arbeiðir fyri dyrkanini av Honum fyri allar muslimar við at missionera og fella dóm yvir avgudarnar...

Nú vil lesarin kanska siga: hetta er at gera eitt lítið mál stórt og blæsa tað upp. Til hetta vil eg svara: mann kann ikki siga, at tað er at blæsa eitt mál upp, tá tað snýr seg um at lyfta Guds merki á jørð. Tí, er ikki pyntusjúkan hjá kvinnuni orsøk til hjúnaðarbandsskilnað, og er ikki hjúnaðarbandsskilnaður orsøk til órudd í ættini? Alt hetta er ólýdni móti Gudi og harumframt tilafturstøða... Verjanin av tí muslimsku kvinnuni er eitt avgerandi samfelagsligt og individuelt framstig, og islam er komið fyri tign menniskja.

**umman: Islamiska meinigheitin ella samfelagið*


*Muslimska slørið umboðar gjøgnum tíðarinnar gongd ymisk virði, ið broytast ættarlið eftir ættarlið. Hendan staðfestingin hevur alstóran týdning, um ein skal koma nær at einum rímiligum svari um, hvat slørið umboðar og um hví muslimskar kvinnur ganga við slørinum.*



